

*Umborð á bátunum hugnaðu tey – ung sum tilkomin – sær óført. Onkur tendraði grillina til ein góðan bita*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Meira enn 4000 fólk vitjaðu á ovastevnu

**Jákup av Skarði, sum er formaður í stevnunevndini, heldur, at meira enn 4.000 fólk í øllum aldri vitjaðu í Nólsoy í vikuskiftinum, og tað er minst líka nógv – ella fleiri – enn nakrantíð áður á eini ovastevnu**

OVASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Veðurgudarnir vóru blíðir á ovastevnu í ár.

Stevnan, sum var um vikuskiftið, varð hildin í fagrasta summarveðri. Øll útlit vóru til, at nógv fólk fóru at vitja í Nólsoy. Soleiðis hevur verið undanfarin ár, og nú útlit vóru til gott summarveður, sum er fyritreytin fyri eini góðari stevnu, kundu nólsoyingar rættiliga gera seg til at taka ímóti nógvum gestum.

Sum leygardagurin leið, sigldu Ritan og Brynhild umframt einir tríggir aðrir bátar títtari og títtari um fjørðin, og fólkið hópaðist upp í litlu bygdini.

Út á leygardagin komu eisini regatta-bátarnir úr Hósvík og saman við nógvum øðrum bátum, sum komu aðrastaðni úr landinum, fyltist víkin. At enda lógu bátar í longum røðum, bæði heimi á gomlu víkini og við havnalagið úti á Klivum, har fiskavirkið er. Tann eina bátaróðin heimi á gomlu víkini rakk heilt av molanum og heim á gomlu brúnna undir Pakkhúsinum.

Í bygdini hugnaðu fólk sær og fóru til tey ymisku tiltøkini, sum vóru á skránni, og umborð á bátunum hugnaðu ung og gomlu sær í sínum lagi.

Nógv varð vitjað millum bátarnar, og umborð á onkrum báti tendraðu tey grillina til ein góðan bita.

Leygarkvøldið var góður dansur í tjaldinum úti á Klivum, har Hjarnar spældu og í Royndini, har Dansiorkestrið spældi. Í Avhaldshúsinum var føroyskur dansur, har fólk úr Slái Ring vóru við.

Vælumtókta kabarettin varð sýnd fleiri ferðir fyri fullum húsi í vikuskiftinum, og seinasta sýning verður í kvøld klokkan 20.

Í Nólsoy vóru nógv tiltøk, bæði fyri børnum og vaksnum, og fólk hugnaðu sær óført.

Nólsoyingar vóru blíðir og tóku ímóti nógvum gestum, sum duttu fram við.

Jákup av Skarði, sum er formaður í stevnunevndini, heldur, at meira enn 4.000 fólk í øllum aldri vitjaðu í Nólsoy í vikuskiftinum, og tað er minst líka nógv – ella fleiri – enn nakrantíð áður á eini ovastevnu.

Hann sigur, at alt bygdarfólkið, sum hann tekur til, hevur tikið hond í – og uttan so dyggan stuðul, hevði tiltakið ikki verið møguligt.

Jákup sigur, at stevnan eydnaðist stak væl, og tað hevði sín stóra týdning, at veðrið var so gott.

Hann fýlist á, at fólk bróta fløskur á slíkum stevnum, tí fløskubrotini kunnu vera til bága, og hetta vísti seg eisini á ovastevnu, har onkur skar seg av brotnum fløskubrotum.

Jákup heldur, at tað hevði verið eitt gott hugskot, um bryggjaríini einans tappaðu øl í plastikfløskur um summarið, tá ið nógvar stevnur og nógvir festivalar eru kring landið.

– Tá høvdu vit í størri mun sloppið undan sovorðnum, leggur Jákup av Skarði, formaður í stevnunevndini, aftrat.



*Dia Ellindsson og Julia Joensen, sum er systir Ova Joensen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ove verður ver

**– Eg kendi ikki Ova persónliga, bert ígjøgnum fjølmiðlarnar, men eftir at hava lisið minnisritið um mannin, eri eg ikki blivin sørt góð við og hugtikin av honum sum menniskja. Hann var raskur, djarvur, hjartagóður, familjukærur og kenslusamur, segði Hildur Eyðunsdóttir, tá ið hon setti ovastevnuna**

OVASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var Hildur Eyðunsdóttir, býráðslimur í Tórshavnar kommunu, sum setti ovastevnuna í ár.

Hon vísti á, at tað í hesum døgum eru 20 ár, síðan Ove Joensen, sáli, róði tann langa teinin – úr Nólsoy til Longulinju í Keypmannahavn.

– Eins og mong onnur gera, minnist eg serliga væl, tá ið Ove 21. juli 1984 á fyrsta sinni legði frá landi av Kongabrúnni í Havn í allarfagrasta summarveðri. Fólk vóru so upplyft hendan dagin, og eg helt tað riggaði so væl, tá ið Útvarpið spældi "I am sailing" hjá Rod Stewart, tá ið hann fór rógvandi út um molan.

Hildur segði seg eisini minnast alt hóvastákið, sum var, tá ið Ove hevði nátt máli sínum í 1986.

– Eg kendi ikki Ova persónliga, bert ígjøgnum fjølmiðlarnar. Mín fatan av honum sum menniskja var, at hann var ein elskuligur og hjartaligur maður.

Hon segði, at hon nú uppundir stevnuna hevur hugsað nógv um, hvat hon skuldi røða um við setanina.

– Hvat vilja nólsoyingar hoyra, og hvat hóskar til eitt slíkt høvi. Sum umboð fyri Tórshavnar býráð kundi eg tikið fram tey átøk, sum kommunan hevur framt í oynni - hvat er í gerð, og hvat er í væntu.

Men, legði Hildur aftrat:

– Eg setti meg fyrst at lesa um Ova í minnisritinum, sum kom út í 1989. Hetta er ein góð kelda. Í bókini eru einar 30 samrøður við fólk við ymiskum tilknýti til Ova – familja, vinir, fyrrverandi starvsfelagar og onnur. Eisini eru greinar úr myndablaðnum NÚ, árini 1978 og 1979 um Ova sum ævintýrara. Í bókini er eisini partur av dagbók, sum Ove tosaði inn á band á ferðini í 1986 og samrøður við Ova. Tilsamans gevur hetta eina sera fjølbroytta mynd av manninum, segði hon og legði aftrat, at hon eftir at hava lisið minnisritið ikki er blivin sørt góð við og hugtikin av manninum.

Hildur segði, at lýsingin av Ova sum smádreingi er, at hann var ein raskar, djarvur, hjartagóður, familjukærur og kenslusamur drongur.

– Ove var sjáldsamur, og tað hevði hann altíð verið. Hann var ikki meira enn 12 ára gamal, tá ið hann javnan róði aftur og fram til Havnar – í øllum veðri í egnum báti at avreiða rippaðar húkar. Hetta var eitt gamalt fýramannafar við viðfestum motori, sum hann sjálvur hevði forvunnið pening til.

Hildur segði, at longu sum smádrongur var talan um ein persón sum var ágrýtin, viljasterkur, arbeiðssamur og djarvur.

– Uttan hesar eginleikar hevði Ove neyvan yvirhøvur hugsað tankan um at gera ta roysnibragd, tað var at rógva allan teinin úr Føroyum til Danmarkar, legði hon aftrat.

Um Ova annars, segði Hildur, at hann í fleiri ár sigldi við skúlaskipinum, Danmark, har hann var sera væl dámdur og framúr góður sjómaður.

– Hóast hann bert hevði barnaskúlan úr Nólsoy, lá so væl fyri at læra, at hann longu eftir fyrsta túrin við skúlaskipinum, kundi halda fram sum kvartermeistari, og sum 21 ára gamal gjørdist hann yngsti bátsmaður, sum hevði verið umborð á nøkrum donskum skúlaskipi.

Hon helt fyri, at tá ið tú lesur um lívið hjá Ova, gerst greitt, at hann var ein ævintýrari burtur av.

– Men hóast hann var bæði dugnaligur sjómaður, fittur í hondum og djarvur sum fáur, so leggja øll størstan dent á, hvussu fittur, vinsælur og trúgvur Ove var.

Í røðuni endurgav Hildur úr inngangínum í bókini um Ova, har hon fann hesar reglurnar:

"Ove kendi nógv fólk, og hann ferðaðist víða um í stutta lívi sínum. Hann var eitt menniskja, sum hevði lætt við at koma í samband við onnur, var prátingarsamur og vinsamur. Hann var blíður og hjartagóður, hjálpsamur og umhugsin. Ove gjørdi ikki mun á høgum og lágum, vaksnum og børnum. Glaða sinnalag og reinleiki hansara gjørdu, at øll, sum kendu Ova, vóru góð við hann. Hann rúnabant fólk og átti alt, sum skuldi til fyri at gerast ein fólkaogn.."



Hetta er 13. ovastevnan, sum verður hildin í Nólsoy, og higartil hevur stevnan bara fingið betri og betri undirtøku.

– Vit gleðast um, at Ove Joensen soleiðis verður verandi fólkaogn, segði Hildur.

Í fyrsta lagi er málið við ovastevnuni at fullføra ynskið hjá Ova at geva børnunum í Nólsoy ein svimjihyl.

– Enn er eitt sindur á mál, men vit mugu vóna, at dagurin ikki er alt ov langt burtur, til hetta ynskið er vorðið veruleiki.

Stevnurøðarin helt, at tað er eitt bragd av nólsoyingum ár undan ári at megna at skipa fyri ovastevnu.

– Her búgva 254 fólk, og nú stevna er, kunnu nólsoyingar vænta sær einar 4000